tíðindablaðið
sosialurin
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
Fyritakssstjóri: Kristian Dahl
Ljósmyndari: Kalmar Lindenskov
Blaðfólk: Randi Jacobsen - Dagny Joensen - Jóshumus L. Eidesgaard - Eyðun Klakkstein - Eiríkur Lindenskov - Áki Bertholdsen
Útgevari, uppseting og prent: P/f Sosialurin
Bústaður: Argjavegi 28 Argjum
Postrúm: Postsmoga 76 110 Tórshavn
Telefon: 11820
Telefax: 14720
Internet: http://WWW.cybernet.dk/faroe-news e-mail: sosialur@olivant.fo

Millumleiðin tann skilabesta

Oddagrein

Í FARNU viku nýtti løgmaður høvi at svara fyrispurning á tingi, sum m.a. snúði seg um framtíðar oljuvinnu í Føroyum. Løgmaður lovaði í svari sínum, at tað fór at verða eitt aðalorðaskifti um alt oljumálið í heyst, eftir at landsstýrið hevði viðgjørt eina nýggja frágreiðing frá Oljuráðleggingarnevndini.

IKKI kann sigast annað enn at tað gongur við rúkandi ferð, tá hugsað verður um, hvussu stutt er frálíðið, síðani ráevni í undirgrundini í vórðu yvirtikin, til nú oljufeløgini hvør í sínum lag gera seismiskar kanningar á føroyskum øki.

TÁ tosað verður um eina møguliga komandi oljuvinnu vil ein avgerandi spurningur altíð vera, hvussu nógv føroyska samfelagið kann fáa burtur úr. Fer ein slík vinna at skapa vælferð í Føroyum, sleppa øll í arbeiði aftur, verður kreppa fortíð og fara vit øll at gerast glað og nøgd!

VIT eiga at gera okkum púra greitt, at talan verður um stórar fyri ikki at siga kollveltandi broytingar í okkara samfelag, verða stórar nøgdir av olju og gassi funnar í undirgrundini. Tað er tey, sum halda, at slíkur útviklingur fer heilt at forkoma okkum sum tjóð, og at vit tí ikki eiga at seta hol á. Heldur bíða og fáa at sjá. Tað er umráðandi at geva hesum sjónarmiði ans eins væl og teimum, sum siga, at vit eiga at "koyra ahead" og skunda undir arbeiði fram móti eini oljuvinnu. At tað kann ikki ganga nóg skjótt.

MILLUM hesi bæði sjónarmiðini liggur eitt sum sigur, at vit hvørki eiga at seta føtur í spenni móti einum útviklingi ella skunda undir henda útvikling meira enn natúrligt og rætt er. Vit teljast millum teirra, ið hava hetta sjónarmið. Finst eitt stórt ríkidømi í okkara undirgrund má tað vera uppgáva okkara at sjá til, at hesi virði koma til høldar á skynsamasta hátt. Tvs. at her má ein neyv stýring til, sum byggir á sunnan fornuft og atlit til okkara samfelag og umhvørvi. Vit skulu ikki steðga einum útvikling, men vit skulu tryggja okkum, at hesin útviklingur ikki sleppur at taka ræðið av okkum og beina okkum inn á eina leið, sum kann koma at skaða bæði okkum og okkara eftirkomarar. Spjaðing og sundurlyndi í føroyingum eru tíanverri alt ov sjónsk enn tann dag í dag, og her er tað, at vit mugu gera okkum púra greitt, at megna vit ikki at standa saman og byggja upp ta neyðugu ekspertisu, sum skal tryggja, at vit ikki verða snýtt ella yvirrend av teimum stóru og multinationalu oljufeløgunum, tá eiga vit at steðga á og umhugsa okkum enn einaferð. Í veruleikanum setir ein komandi oljuvinna okkum "upp á prøva". Og tað er her vit mugu seta okkara álit á tað nýggja og uppvaksandi ættarliðið av m.a. vælútbúnum føroyingum. Tað er við teimum vit skulu leggja lunnar undir eina komandi oljuvinnu. Og tað er longu nú, at vit kunnu njóta ágóðan av gongdini. Ungir og fyri tað til komnir føroyingar eiga nú at útbúgva og umskúla seg til arbeiði í hesi vinnu. Hetta kann alt fyri eitt vera við til at minka um arbeiðsloysi og samstundis vera við til at byggja upp bæði vitan og royndir á økinum, um oljan er her. Tí er hugaligt at sjá, at Statoil, Mobil, Enterprise, Geco Prakla og BP og Shell hvør á sín hátt royna at bjóða føroyingum arbeiði í oljuvinnuni aðrastaðni. Júst hetta er kanska mest týðandi parturin í øllum oljuprátinum.

Sosialurin

Lesarabrøv

Viðmerkingin til sendingina Orð og Mál

Í sendingini «Orð og Mál» varð týsmorgunin 14. í hesum greitt frá hvørkikynsorðum, ið hava endingina **ið** ella **ð** í hvørsfalli og hvønnfalli í eintali, tá ið tey eru bundin. Nevnd vóru nøkur hjáorð, sum verða skrivað við **ð**, t.d. tíðliga, týðuliga og síðla. Hóast hesi fyrndarorð – eins og mong onnur teimum á baki – altíð verða skrivað við **ð**, er tað tó ikki altíð so eyðvitandi hjá lurtarum at duga á at skyna, tá ið ivaspurningur verður havdur á lofti, um skrivað eigur at verða annaðhvørt við fyrra **i** ella seinna **ý**. Hjá tí, ið legði sendingina til rættis, átti at borið til at leggja sær eina við – hvørs orð millum manna javnan elva til málvillur hjá ávísum torskrivaðum orðum – at skila til í millum fyrra **i** og seinna **ý**, hvussu stavirnir verða frambornir, eins og **a** og **æ**, t.d. maður, klæði. Eingin bókstavur eitur enn **a** á føroyskum, men fyrra **a** [a framborið sum æ], somuleiðis **æ** [æ framborið sum seinna æ].

Veit, at tað ikki altíð ber til at lofta øllum tí, ið borið verður fram, men til ber miðvíst at reka tað aftur inn á beint, sum farið er skeivt. Í einari knappari sending sum hesari, ræður tí at vera umhyggin, hvussu rætt stavseting altíð eigur at verða framborin. Annars tøkk fyri góða sending.

lurtari

Sámal Petur! Sam er ónýtiligur til Sandoynna

Harra landsstýrismaður í samferðslumálum

Landsins yvirvøld hevur nú í nøkur ár tveitt alla ábyrgd fyri borð, tá talan er um, at Sandoyggin hoyrir til hetta annars frálíka landið, sum eitur Føroyar.

Hetta kunnu tykjast hørð orð, men ikki skuldi verið neyðugt at endurtikið, at Sandoyggin var tveitt út í arbeiðsloysi og eingin tykist at eiga ábyrgd av hesum, hóast fólk eru vald til at stýra og at hava ábyrgd av hesum landi og fólkinum, ið her býr.

Vit kunnu minna okkum á hugtakið «Tann gloymda oyggin». Hetta orðið var fyri nørkum ár um dagligdags orð, tá tosað var um Sandoynna. Men so kom tín flokkur, harra landsstýrismaður, við hugtakinum «Sandoyggin í focus», so ein lítil neisti birtist. Men tað varði ikki leingi, so kom norðanlotið og køvdi henda litla neistan, og hetta sama norðanlotið sløkti alt tað ljósið, sum sandoyingar við togvið stríð høvdu kveikt, og tað sigldi myrkursins køvandi nátt yvir allan framburð í hesi annars so tiltikna framburðsoyggj, Sandoynni. Og eingin bati er í ljósmála. Nei, her stendur við og versnar og kanska verri enn tað.

1. mai í ár fingu vit so aftur strandfaraskipið Sam í sigling um Skopunarfjørð. Óneyðugt skuldi verið at sagt, at hetta skipið á ongan hátt egnar seg til hesa sigling, hvørki á sumri, ei heldur nakra aðra ársins tíð. Skipið hevur alt ov litla motororku, tað er neyvan nakar útróðrarbátur í Skopunarhavn, sum gongur so seint sum Sam. Er streymurin ikki til vildar, so er galið við tíðsplaninum hjá hasum, sum tit kalla fyri skip. Skal Sam í fraktrútu út í Hest, so heldur hann ikki tíðina til Skopunar, lotar tað av hanakjafti, so er neyðugt at binda allar bilar fyri ikki at tala um, nú landsynningur skuldi blivið liggjandi ætt!

Sum rosinan í pylsuendanum, so skal Sam røkja sjúkraflutningin til Nólsoyar, Hest og Sandoynna.

Tann fyrsta veruliga royndin við sjúkraflutninginum fór fram í dag 13. mai. Sandoyingar møttu í góðari tíð fyri at vissa sær pláss kl. 15.45 í dag til Skopunar. Hvat hendir? Sam fer í sjúkraflutning til Nólsoyar og var ikki á Gomlurætt fyrr enn kl. 17.30 við sjúklinginum. Har stóð sjúkrabilur og bíðaði fyri at flyta sjúklingin til Havnar. Ikki fyrr enn kl. 18.30 sigldi Sam aftur av Gomlurætt við ferðafólkunum, sum áttu at fara í Sandoynna kl. 15.45 og 17.00.

Ein má spyrja, hvør kann finna seg í slíkum? Hvar er logikkurin?

Tórshavnar havn liggur dyrandi full av bátum og tveimum strandfaraskipum, Rituni og Ternuni. Røkkur planleggjanin ikki so frægt hjá tykkum, sum ábyrgd hava, at tit fáa loyst eitt so einfalt mál sum sjúkraflutningin úr Nólsoy til Tórshavn, uttan so, at vit sandoyingar skulu missa bæði tíð og pening, so eru ikki góðar vónir fyri, at tit klára at stýra føroyska samfelagnum.

Álvaratos, harra landsstýrismaður, nú má vera nóg mikið. Hygg í allar skuffurnar hjá tær, og vita, um tú ikki finnur eina ætlan um, at sandoyingar skulu hava eitt hóskandi skip at sigla í millum Gomlurætt og Skopun. Hygg eftir, hvat dato henda ætlanin fyrst kom í ljósmála og sig okkum, um tað ikki er Sandoyggin, sum eigur fyrsta tørn til nýtt skip áðrenn nakar annar.

Sandoyggin fór álvarsliga úr focus. Tit mistu linsuna á gólvið, antin duga tit ikki at seta hana í aftur ella vilja tit ikki.

Men líka mikið, til ber at skifta apparatið, sum linsan situr í, út, og bera tit ikki skjótt at við at finna focusin á Sandoynna aftur, so mugu vit gera tað fyri tykkum.

Heima á Sandi
13. mai 1996

Elis Poulsen

NB. Tað er nakað síðani, at sandoyingar valdu tveir tingmenn at umboða seg alment. Veit nakar at siga, um teir eru til?

Bingotølini í dag:

7	53